HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

# Varastjóri til Suðuroyar Sjúkrahús

Starvið sum varastjóri á Suðuroyar Sjúkrahúsi er leyst at søkja til setan 1. juni 2017 ella eftir nærri avtalu.

Sum varastjóri verður tú ein partur av yvirskipaðu leiðsluni á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Næst fyrisetti er sjúkrahússtjórin.

Suðuroyar Sjúkrahús hevur umleið 110 fólk í starvi í fleiri yrkisbólkum.

**Ábyrgd og heimildir hjá sjúkrahúsleiðsluni**

- ✓ Sjúkrahúsleiðslan hevur í felag yvirskipaðu leiðsluna av Suðuroyar Sjúkrahúsi. Í hesum liggur: visjónir, mál og menning, sjúklingaviðgerð, diagnostikkur og røkt, gransking, langtíðar fysisk og fíggjarlig planlegging, stovnsmenning og leiðslumenning.
- ✓ Sjúkrahúsleiðslan skal virka og uppfatast sum ein heild við sjúkrahússtjóranum sum tann, ið hevur endaligu ábyrgdina yvirfyri Heilsu- og innlendismálaráðnum.

**Serligt ábyrgdarøki hjá varastjóranum**

- ✓ Ábyrgd av yvirskipaðu samskipanini á røktarfakliga økinum.

**Ábyrgdarøkið og arbeiðsuppgávur eru neyvari greinaðar í starvslýsing, sum er til taks.**

**Førleikakrøv**

- ✓ Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur (autorisatión)
- ✓ Útbúgving innan sjúkrarøkt frá hægri lærustovni
- ✓ Leiðsluroyndir, bæði innan røktarøkið og við fíggjarætlanarábyrgd
- ✓ Kunnleiki og innlit í fíggjarstýring
- ✓ Holla vitan um sjúkrarøktina á fleiri økjum
- ✓ Framskygni viðvíkjandi røktarfakligu menningini
- ✓ Kunna taka avgerðir saman við hinum í leiðsluni
- ✓ Skapandi evni og óbundin av vanahugsan, duga og tora at raðfesta uppgávur
- ✓ Góð samstarvsevni
- ✓ Góð samskiftisevni
- ✓ Góð leiðsluevni

**Løn og setanarviðurskifti:**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, stig 48 umframt eina ikki eftirlønargevandi leiðaraviðbót, sum er 5.000 kr. um mánaðin. Setanarøkið fevnir um Heilsu- og innlendismálaráðið og stovnar undir tí. Arbeiðsstaður verður Suðuroyar Sjúkrahús. Setanarmyndugleiki er Heilsu- og innlendismálaráðið. Talan er um fulltíðarstarv.

Tann, ið settur verður, má tola møguligar broytingar í starvinum.

Nærri fæst at vita um starvið, starvslýsing v.m. við at venda sær til Ronnie Midjord, sjúkrahússtjóra, tlf. 343300 ella ronnie@ssh.fo.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

Sjúkrahússtjórin
Suðuroyar Sjúkrahús
Sjúkrahúsbrekkan 19
FO-800  Tvøroyri

Umsóknarfreistin er 10. mai 2017.